**Fundarfrágreiðing frá lestrarráðsfundi 09.04.18**

**Á fundi:** Árni Jóhan Petersen, formaður
Jens Christian S. Justinussen, útbúgvingarleiðari
Bárður Larsen, útbúgvingarleiðari
Ingmar Berg Mikkelsen, lesandi, næstformaður
Karin Jóannesardóttir, lesandi
Emil Hermansen, lesandi (sjúkur)
Sigrid Joensen, skrivari

**Uppfylging frá seinasta fundi:**

Áheitan frá lestrarráðnum í sambandi við rættlestur av skeiðslýsingum. Eingin sum rættlesur í løtuni. Árni tosar við Hans Andrias um hetta og vendir aftur.
Enskar skeiðslýsingar skulu sendast til Johan Hansen, fyrisitingarstjóra, sum sendur tær víðari at umseta.
Peningur er ikki tøkur til føroyskan rættlestur samb. Hans Andrias Sølvará.
Skal síðutal á pensum vera við í skeiðslýsingunum?
Umrøtt varð at fáa leistin í løgfrøði bæði til enskar og føroyskar skeiðslýsingar. Finna eina loysn til føroysk orð fyri hugtøk.

1. **Katalog fyri valfak á Setrinum (Árni, Karin) –dekan: Næsta fund**

**2 Deadline fyri umsóknir (t.d góðskrivingar): Næsta fund**

**Námsskipanir: Master learning.** Ikki góðkend. Tó nevndi Erika, at hon hevur verið góðkend. Árni hevur lisið fundarfrágreiðingarnar, men har er onki, sum bendir á, at Námsskipanin endalig er góðkend. Árni hevur tosað við Eriku. Hon tillagar eftir viðmerkingum, so sendir hon Námsskipanina innaftur.
Umrøtt varð at fáa ein leist fyri allar námsskipanirnar. Nógvar viðmerkingar vóru til námsskipanina, sum Árni saman við Eriku skulu fáa uppá pláss.

3. **Skeiðslýsingar:**

**2481.17 Masterlæruprojekt**: Ein broyting: Fortreyt fyri at sleppa upp til próvtøku (2 x staðið) 2 framløgur slettað. Læru- og undirvísingarhættir sletta mandatory. Próvtøkuháttur: Manglar nøgd av orðum. Góðkend treytað av, at hetta verður umsett til føroysk. Ivamál um skeiðið stendur mát við 10 ECTS próvtøkuháttin. Árni tosar við Hans Andrias um tað.

**2482.17 Methodology in Master learing**
Tillagað próvtøkuhátt, so at nú er ein fortreyt fyri at sleppa til próvtøku, at tey hava skrivað sína "masterlæruavtalu". Lestrarlisti skal hava síðutal. Góðkend treytað av, at hetta verður umsett til føroyskt. Broyta árstal til 2018.

**2446.18 Fiskiveiðirættur**: Próvtalsstigi broytast til 7. Próvtøkuháttur: 4 tíma skrivlig roynd. Góðkend við smærri broytingum.

**2447.18 Sosialrættur:** Góðkend við smærri broytingum. Broyta próvtalsstigan til 7. Býta um próvtøkuhátt við Próvdøming.

**2477.17 Masterlæra, Politikkur og umsiting í smátjóðum og oyggjasamfeløgum:**
Ymiskar broytingar/tillagingar (sí lepa/teldupost)
Próvtalsstigi broyttur til 7. Læruúrtøkur: meta um. Broyta orðingar í skeiðslýsingini, taka hetta upp seinni til umrøðu. Innihald: Meira ítøkiligt. Skeiðslýsingar broyta árstal til 2018. Ikki góðkend. Árni tosar við Eriku, sum tillagar.

**2478.17 Masterlæra, Moderniseringssøga í smátjóðum og oyggjasamfeløgum:**
Ymiskar broytingar/tillagingar.
Próvtøkuháttur: Hyggja eftir skrivligu uppgávuni? Broyta árstal til 2018. Ikki góðkend. Árni tosar við Eriku, sum tillagar.

**2479.17 Masterlæra, Sosialvísindi og samfelagsplanlegging í smátjóðum og oyggjasamfeløgum.**
Ikki góðkend. Árni tosar við Eriku, sum tillagar.

**2448.18 Substatsligar stjórnarskipanir:** Góðkend við smærri broytingum.
Læruúrtøka: í so nógv punkt. Nr. 2 leggjast saman við nr. 5, nr. 4 leggjast saman við nr. 6. Próvtalsstigi broytast til 7.

**2365.16 Mannarættindi, religión og politikkur:** frá BA til MA Góðkend
Próvtalsstigi 7
Próvtøkuháttur: Munnlig próvtøka er treytað av, at heimauppgávan er latin inn. Skeiðsnummarið skal broytast. Árni tosa við Heina í Skorini um læru- og undirvísingarhættir.

**2489.16 Ástøðiligt essay Masterlæru:** Nógvar broytingar. Heitið broytast til uppgáva, og Title broytast til paper. Endamál: Synopsa broytast til Rit.
Læru og undirvísingarhættir: Essay broytast. Krav at 1/3 er upprunatekstur.
Lestrarlisti: broytast frá Litteraturlisti til lestrarlisti. Góðkend við smærri rættingum.

**2531.18 Økonometri.** Góðkend við smærri broytingum. Próvdøming broytast frá innan- til uttansetur.

**Innovatión:** Nýtt skeiðsnr. Góðkend við smærri broytingum. Lestrarlisti tøkur á deildini. Málslig og skrivlig uppgáva, íblástur frá skeiðnum hjá Bárður Larsen.

**Corporate Social Responsibility í føroyskum høpi**: Nýtt skeiðsnr. Góðkend við smærri broytingum. Lestrarlisti tøkur á deildini. Íblástur frá Bárður Larsen um samskifti at miðla og orða.

**2369.18 Ritgerð 2 :** Góðkend. Fortreyt: framløga. Rættað brævhøvdið til Søgu og Samfelagsdeildin. Ensk skeiðslýsing manglar.

**2664.18 Praksis skeið GIS:** Góðkend. Próvtøkuháttur broyttur til staðið/ikki staðið.

4. **Hvat er ein nóg stór broyting í skeiðslýsing til, at hon skal viðgerast í lestrarráðnum (JC) Næsta fund**

5. **Námsskipanir: Næsta fund**

6. **Ymiskt: Næsta fund**